gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Trý hava fult og fýra hava einki

**VB, GÍ og HB hava einki mist í tveimum teimum fyrstu umførunum. Komandi fríggjadag hittast HB og GÍ. B68 og KÍ taptu bæði á heimavølli hesa ferð. Tey eru stigaleys, og í næsta umfarinum hava bæði liðini torførar uppgávur á útivølli**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*


*Einki er at ivast í, at sum støðan er í løtuni, liggur størsta trýstið á toftamonnum, sum enn hava fyrsta stigið til góðar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað tykist ganga skjótt at sálda dumbuna frá hveitinum í ár. Tvey umfør eru spæld í bestu mannfólkadeildini, og tað eru longu seks stig á muni ímillum fremstu liðini og tey, sum hava staðið seg vánaligast.

VB, GÍ og HB hava øll fult stigatal, meðan B68, KÍ, EB/Streymur og FS Vágar einki stig hava fingið.

Felags fyri VB og HB var, at hesi liðini vunnu útidystir, sum tað plagar at vera vanligt at rokna sum torførar. HB var favorittur í Klaksvík, og ta uppgávuna megnaðu teir til fulnar. VB er meistari, og í blaðnum leygardagin segði Popczynski, at teir fóru á Svangaskarð eftir øllum stigunum, og teir greiddu sína uppgávu til fulnar.

Tá hugsað verður um tilgongd og frágongd hjá ymsu feløgunum, og um, hvat tað hevur verið roknað við av feløgunum, so var avrikið hjá VB sera gott.

FS Vágar skuldi havt verið í Miðvági sunnudagin, men dysturin var avlýstur, sum tað var orðað. Tað er sjálvandi ikki rætt, at dysturin varð avlýstur. Hann skal spælast, og vit hava skilt, at hann verður spældur mitt í komandi viku.

## Trýstið

Soleiðis sum tað hevur lagað seg higartil, so er einki at taka seg aftur í, at størsta trýstið liggur á B68, og at næststørsta trýstið liggur á KÍ. Í Klaksvík hava tey gjørt nógv fyri at undirstrika, at teir eru farnir undir at byggja eitt nýtt lið. Harvið vilja teir sjálvandi hava, at nakað av trýstinum skal takast burtur av teirra monnum. Men í felag, ið hevur so stóra søgu sum KÍ, er tað ikki undarligt, um tað hevur rembingar við sær, at liðið eftir fleiri umfør er eiðasørt á støðutalvuni.

Tá hugsað verður um manningarligu flytingarnar ímillum feløgini, hevur B68 verið frammarlaga. Málið hevur verið Europa Cup, og tað skuldi ikki verið veruleikafjart, tá hugsað verður um, at talan er um eitt av heimligu feløgunum, sum er best umboðað á landsliðnum. Higartil hevur einki eydnast hjá B68 í landskappingini.

Spurningurin er so, hvussu teir á Toftum og teir í Klaksvík fara at megna so at siga at handfara støðuna, nú byrjanin hevur verið so serliga soltin. Áður hevur verið at sæð, at samanhaldið og stríðsandin styrkna í slíkari støðu, men tað er ikki ókent, at um tey, sum hava ábyrgd, ikki megna at savna, so kann tað vera so skjótt, at máttloysið fer at gera um seg.

B68 og KÍ eiga torførar uppgávur í triðja umfarinum. Klaksvíkingar skulu spæla á útivølli ímóti føroyameistarunum í Vági, og toftamenn skulu inn í Runavíkina at telvast við grannarnar í NSÍ.

## Spenningurin

Fótbóltslagið er í topp í Gøtu, í Havnini og í Vági. Og nú verður bíðað eftir sonnum toppdystum. Teir koma tvey tey næstu umførini, og í báðum umførunum eigur HB heimavøll. Triðja umfarið verður spælt longu fríggjadagin, sum er dýri biðjudagur. Tá fær HB vitjan av GÍ. Annað vikuskiftið verður fjórða umfarið á skránni, og tá skulu FM vinnararnir úr Vági spæla í Gundadali ímóti HB. Spurningurin er so, hvussu tað fer at síggja út, tá fimta umfar fer at standa fyri framman. Í tí umfarinum skal GÍ til Vágs, og HB skal til Runavíkar.

Tá HB í fyrsta umfarinum hevði vunnið sannførandi á B68, hildu vit, at teir máttu finna seg í at teljast ímillum favorittarnar til FM heitið. Eftir dystin í Klaksvík eru teir sjálvandi framvegis ímillum favorittarnar. Hvussu tøtt kappingin í toppinum verður fæst nógv meiri at vita um trý tey næstu vikuskiftini.

NSÍ og B36 spældu málleysan javnleik í fyrsta umfarinum. Sunnudagin megnaði B36 tað, sum varð roknað við av teimum, tá B71 vitjaði í Gundadali. Fríggjadagin skal B36 til Eiðis, og tá verður eisini roknað við, at teir taka alt. Stóra avbjóðingin verður, tá B36 annan sunnudagin fer at royna seg í Gøtu.

## Steypakappingin

Nógva staðni var tað rættuligt summarveður sunnudagin. Onkur fótbóltsáskoðari tók til, at veðrið líktist røttum verkfalsveðri. Tá varð sipað til drúgva verkfallið í góðveðrinum miðskeiðis í áttati árunum.

Eitt møguligt verkfall fer neyvan at ávirka fótbóltskappingarnar á sama hátt, sum eitt verkfall hjá Starvsmannafelagnum hevði gjørt, men nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður við tí.

Fótbóltsligu avbjóðingarnar eru nógvar og stórar komandi vikurnar. Eins og í fjør, so er eitt umfar í landskappingini lagt dýra biðjudag. Tað er snilt gjørt av FSF. Harvið vera øll liðini eins fyri, tá fyrru hálvfinalurnar verða á skránni sunnudagin. Áður hava hálvfinalurnar verið fríggjadag, og tá hava hálvfinaluliðini verið nógv verri fyri enn hini, tá umfar í landskappingini hevur verið á skránni tveir dagar seinni.

Í fyrru hálvfinaluni verður spælt soleiðis: KÍ–NSÍ og B36–HB. Í triðja umfarinum í landskappingini verður spælt soleiðis: HB–GÍ, VB–KÍ, NSÍ–B68, B71–FS Vágar og EB/-Streymur–B36.


*Eisini í Klaksvík er trýst á leikarunum. Hinvegin hava teir longu boðað frá, at teir nú eru í ferð við at spæla eitt nýtt lið saman*
*Mynd: SjH*

gult15 cyan15 magenta15 svart15




